átrúnaður

Lagt til rættis: Snorri Brend *snorri@sosialurin.fo*



orðið

## Beinleiðis atgongd

**"Við tað at vit tá hava ein stóran høvuðsprest, sum er farin ígjøgnum himnarnar, Jesus, son Guðs, tá latum okkum halda fast við játtingina!"**
Hebr. 4,14

Eina ferð um árið kundi ísraelski høvuðspresturin fara gjøgnum tey uttastu økini í templinum og inn í tað allar heilagasta, fyri at útvega fyrigeving fyri syndirnar hjá fólki hansara. Har vóru mangir prestar, men bert høvuðspresturin kundi gera hetta. Bíblian greiðir frá, at "Kristus gekk ikki inn í halgidóm, gjørdan við hondum, avmynd av hinum sanna halgidómi, men inn í sjálvan himmalin, til tess nú at koma fram fyri ásjón Guðs fyri okkara skuld (Hebr. 9,24).

Jesus steig niður gjøgnum fyrsta himmalin, sum vit kalla atmosferan. Síðani steig hann gjøgnum næsta himmalin sum vit tosa um sum tað ytra rúmið. At enda kom hann inn fyri Guds trónu í triðja himmalinum. Hvat høvdu vit ikki gjørt í bøn, fyri at enda í triðja himmalinum, har Guds tróna er? Vit kunnu bert ikki koma hagar, uttan at onkur tekur okkum við inn hagar.

Ein ungur drongur kom undir borgarakrígnum í USA framvið einum hermanni, sum sat uttanfyri Hvítu húsini og sá sera keddur út. Drongurin spurdi, hvat bilti og hermaðurin svaraði honum, at hann so fegin vildi tosa við Lincoln forseta, men at vaktarmenninir forðaðu honum í hesum. Drongurin tók síðani hermannin í hondina og leiddi hann beinleiðis inn á skrivstovuna hjá forsetanum. "Pápi", segði drongurin. "Hesin hermaðurin má sleppa at tosa við teg!". Drongurin var sonur forsetans, og hevði beinleiðis og óavmarkaða atgongd inn til faðir sín.

Av tí at Jesus, sonur Guds, heldur seg til sín Faðir, kann hann taka alt tað burtur, sum kann forða okkum vegin. Tað er tí at vit, tá vit biðja í Jesu navni, hava beinleiðis atgongd til Gud og uttan treytir eru vælkomin í hansara nærveru, har hann við kærleika møtir okkara tørvi.

(Kelda: UCB.dk)

# Øðrvísi møtir í samkomuni

**Leiðslan í samkomuni í Evangeliihúsinum hevur ynskt at broyta møtiformin eitt sindur. Nýggju tiltøkini eru nú farin av bakkastokki**



*Petur Zachariasen var vertur og hevði fleiri gestir í "studio". (Mynd: gospel.fo)*

**Havn:** Fyrsta kvøldið í hesum sambandi var sunnukvøldið 12. august, sum varð skipað sum eitt talkshow við verti og gestum.

Vertur hetta fyrsta kvøldið var Petur Zachariasen og hevði hann vitjan av trimum fólkum, sum høvdu ymiskt upp á hjarta.

Hesi trý vóru Jóhannes Ólavsson, Majbrith Jakobsen og Edith Mørkøre.

Felagsnevnari teirra var út frá heitinum á møtinum, at tey høvdu ikki grivið sína talent niður. Tey høvdu tvørturímóti valt at brúka hesa í arbeiðinum at boða gleðiboðskapin út á ymiskan hátt.

- Rættiliga nógv fólk vóru á hesum møtinum. Og vit eru samd um, at tað eydnaðist sera væl, sigur samkomuleiðarin, Dánjal á Dul Jacobsen.

Til eitt slíkt talkshow hoyrir sjálvandi eisini tónleikur, og hesum innslagnum stóðu Majken Háberg Hansen, Eyðun Johannesen og Stella Zachariassen og onnur fyri.

### Sangur og kvøldmáltíð

Næstseinasta sunnukvøld var aftur eitt spennandi tiltak á skránni. Tá var hildin ein pallborðsfundur, har mentamálaráðharrin, Jógvan á Lakjuni, Eyðstein Borgardal frá Youth With á Mission og Dánjal á Dul Jacobsen úr Evangeliihúsinum tóku lut.

Her fingu áhoyrararnir møguleika at seta teimum trimum spurningar út frá dagsins evni, sum var kristindómur og mentan.

Á skránni hetta kvøldið var eisini sangur, har Theodor Petersen og Jógvan á Lakjuni sungu tveir sangir saman sum ein endi uppá hetta væleydnaða kvøldið.

Seinasta sunnukvøld var eitt fjølbroytt sangkvøld á skránni, og nú sunnukvøldið verður møti har tosað verður um Kvøldmáltíð Harrans. Eftir hetta møtið verður ein náttturðabiti við føroyskum viðskera.

# Kristindómurin kom tíðliga til Grønlands

**Skrivligar keldur kunnu nú staðfesta at Grønland varð kristnað um ár 1000. Samstundis verða kirkjan hKristindómurin kom tíðliga til Grønlandsjá Tjóðhild, konu Eirik Reyða, mett sum tann fyrsta í økinum. Men fornfrøðiligar kanningar siga kortini eina aðra søgu um tey fyrstu kristnu í oynni**

Ólavur Tryggvason er tann kongurin, sum fær heiðurin av at hava kristnað Grønland fyri 1000 árum síðani. Men nú hava fornfrøðingar funnið fram til fleiri kirkjur frá seinnu helvt av 900-talinum.

Tær grønlendsku kirkjurnar hava leingi verið í kikaranum hjá granskarum. Tær eru væl varðveittar og eru tí vælegnaðar til kanningar av upprunanum, tí tær teljast millum tær elstu í Norðurlondum.

Flestu kirkjurnar eru úr steini, men fornfrøðingar eru eisini komnar fram á kirkjur úr træi og torvi.

Við fleiri av norðbúgva-kirkjunum eru funnar fleiri vælvardar beinagrindir, og hava hesar eisini gjørt sítt til staðfestingina av kristindóminum í Grønlandi.

Sambært Saga Eiriks Reyða var tað Leivur Eiriksson sum í ár 1000 kom við kristindóminum til Grønland. Mett verður kortini, at hann hevði ein prest við sær, sum Ólavur Tryggvason hevði sent hagar. Eftir hetta vórðu bygdar ótrúliga nógvar kirkjur í Grønlandi – tólv í Eysturbygdini, umframt eitt nunnu- og eitt munkakleystur, og fýra kirkjur í Vesturbygdini.

## Gudstænasta og sunnudagsskúli samstundis

**Argir:** Í Kirkju og Missiónshúsinum á Argjum hava tey í eina tíð arbeitt við hugskotinum um at hava gudstænastuna og sunnudagsskúlan um somu tíð. Farið varð undir hesa skipanina fyrr í mánaðinum, sunnudagin 12. august. Skipanin virkar soleiðis, at tá tey eldru sita undir gudstænastuni, fara børnini í sunnudagsskúla. Her koma tey so at syngja saman og eisini hava dagsins bíbliutekst.

- Hetta kemur at virka á einum royndarstøði fyri fyrst. Men fer tað at roynast væl, verður hildið fram við tí, verður sagt.

## Flyta sunnudagsskúlan til kl. 12

**Oasan:** Í hesum døgum verður arbeitt við at innrætta kjallaran í samkomuhúsinum í Hoyvík. Hetta fer at geva samkomuni munandi betri umstøður til arbeiðið, millum annað sunnudagsskúlan. Higartil hevur sunnudagsskúlin verið hildin kl. 14, men ætlanin er nú at flyta hetta fram til kl. 12 ístaðin. Mett verður, at henda tíðin er meiri hóskandi til virksemið í samfelagnum, og tí at morgungudstænasturnar í samkomuni liggja kl. 11. Spurningurin er lagdur út til foreldrini at siga sína hugsan um, men einki verður kortini gjørt fyrrenn kjallarin er klárur.

## Skeið fyri kórleiðarar

**Skáli:** Ert tú kórleiðari ella ætlar tú at byrja eitt kór, er møguleiki at hitta onnur sum ganga við somu hugsan. Sang- og Tónleikanevndin hjá Heimamissiónini skipar leygardagin í næstu viku fyri kórleiðaraskeið í Meinigheitshúsinum á Skála. Undirvísarar verða tveir royndir harrar í hesi bransjuni – Ásbjørn Berthelsen og Ólavur Jøkladal. Skeiðið vendir sær til øll, sum hava við kórleiðslu at gera, annaðhvørt so talan er um barnakór, ungdómskór, vaksnamannakór, lovsangsbólk ella annað. Skeiðið byrjar kl. 10 og endar seinnapartin henda leygardagin 8. september.